Fra: Karl-Erik Reynheim <ker@faroeagency.fo>
Sendt: týsdagur, 23. februar 2021 15:57
Til: Løgting <logting@logting.fo>
Cc: 'Jórun Gardar' <jorun@industry.fo>
Emne: TIL FÍGGJARNEVNDINA

TIL : FÍGGJARNEVNDINA
CC : VINNUHÚSIÐ, Jórun Gardar

FRÁ : FAROE AGENCY P/F

VIÐV : Mál nr.: 20/00427 Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll.

Góðan dag,

Væntandi verður hetta málið beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Vit vilja visa á hettar í uppskotinum :

25. § 28, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Stk. 2. Skip, ið tollvaldið ætlar at kanna, og sum sigla í føroyskum tolløki, skulu leggja at føroyskari bryggju, tá ið tollvaldið krevur tað. Skip í skaðaleysari gjøgnumsigling eru undantikin hesum kravi."

Og spyrja :

Hvussu verður **føroyskt tolløki** definerað ?

Hvussu verður **skaðaleys gjøgnumsigling** definerað **?**

Og so vilja vit fegin fáa at vita púra greitt hvør skal gjalda tá tollvaldið krevur at eitt skip skal leggja at føroyskari bryggju til kanningar.
Eitt skip sum kemur til bryggju í føroyskari havn skal vanliga gjalda havnagjald, brúgvagjald, fyri loðs, fyri loðsbát, fyri sleipara, fyri fólk at binda og loysa og ikki minst – fyri tollavgreiðslu.
Um so er at man vil leggja hesar útreiðslur á skipini, tá tollvaldið krevur at fáa skip inn, vilja tit so gera og senda út eina púra greiða kunning um fíggjarliga vandan hjá skipum við at koma í føroyskt tolløki ?
Skulu vit, td, boða BIMCO frá óvissuni / vandanum ?

Hvat við at gera eina heimild hjá hjá tollvaldinum á sama hátt sum við Port State Control (PSC) ?

With best regards / Vinarliga

Karl-Erik Reynheim
CEO
Faroe Agency p/f
Yviri vid Strond 23,
FO-100 Torshavn,
Faroe Islands

Mobile: +298 231993
Direct : +298 611913
Office: +298 351990
Fax: +298 351991
E-mail: ker@faroeagency.fo